Grindaboðini skjótast gjørligt



Eini 60-70 fólk hava teknað seg til grindaskipanina hjá grindaformanninum í Havn.

Tað er stórur áhugi fyri at fáa grindaboðini skjótast gjørligt. Tað er grindaformaðurin í Havn, Jákup Andrias Mohr sannførdur um.

Í bløðum og útvarpi í síðstu viku bað hann tey, sum vildu hava fráboðan um grind beint eftir at grindaboðini koma, um at siga sær frá, og telefonin gekk heit. Millum 60 og 70 fólk eru við í grindaskipanini.

Hendan skipan virkar á tann hátt, at so skjótt sum grindaformaðurin fær grindaboðini, boðar hann sínum monnum frá beinanvegin, nær á samdøgrinum hetta so enn er.

Eisini sum bjargingarskipan

Jákup Andr. Mohr sigur, at hin almenna føroyska bjargingartænastan kundi virkað munandi betri, m.a. um hendan grindaskipanin varð knýtt at henni. Hann hugsar sær eina tílíka grindaskipan fyri hvørt øki í landinum. Er okkurt áfatt og brúk er fyri nógvum fólkum til hjálpararbeiðið, er einki til hindurs fyri, at fáa fatur í grindafólkunum eftir heilt stuttari tíð, og kunnu hesi verða til stóra hjálp, sigur Jákup Andrias.

tór.-

Discobussar
eina roynd verd

Við Discobussinum er tryggari at koma heim úr dansi

Avleiðingarnar av teirri stóru náttarferðsluni verða alt meira ræðuligar og tær álvarsligu vanlukkurnar økjast í hvørjum.

Hendan ferðslan er í nógvum førum í samband við tá ungfólk fara í og úr dansi í aðrari bygd enn henni tey sjálv búgva í, og ofta kemur tað fyri, at bilførarin als ikki er koyriførur.

Tí legði Hallstein Sigurðsson, limur í samferðsluráðnum, uppskot fyri ráðið um — sum eina roynd — at seta eina bussrutu í verk í fyrsta lagi í Eysturoynni, ið skal koyra ungdómin til heimbygd sína eftir dansin. Eftir uppskotinum skal nú samferðsluráðið gera nærri kanningar um hvussu hetta letur seg gera.

Góðar royndir í t. d. Eysturríki

Tað er sjálvandi ikki bert í Føroyum, at ungfólk fara í dans í aðrari bygd enn síni egnu og vandamálini í hesum sambandi eru tey somu.

Í Eysturríki hava tey gjørt væleydnaðar royndir við sokallaðum Discobussum. Bussarnir koyra frá dansihølunum, tá dansurin er liðugur og hesir verða nógv nýttir, sigur Olivur Næss, leiðari av Ráðnum fyri Ferðslutrygd.

Olivur frætti um hesa skipan, tá hann var á eini ferðsluráðstevnu í Eysturríki. Hann sigur, at skipanin skuldi fyrst galda í ein mánað, men at hendan royndartíðin eydnaðist so væl, at hon varð longd munandi.

— Vit hava so ringar royndir av okkara náttarferðslu, at vit eiga at hugsa ótraditionelt, og tí taki eg heilt og fult undir við eini roynd at nýta náttarbussar úr dansi. Hetta eigur at fyrireikast væl og sjálvandi eisini í samráð við tey ymsu dansistøðini so ein føst ætlan kann leggjast, sigur Olivur Næss.

— Einki er at ivast í, at onkur verður ivasamur um eina tílíka skipan, og kanska hugsar sum so, at hetta fer illa við bussunum. Men soleiðis kunnu vit ikki hugsa. Sjálvandi skulu bussarnir ikki nýtast sum náttarbarr og sjálvandi eiga fólk at ganga væl um, men hesin óttin eigur ikki at forða fyri, at ein roynd verður gjørd, sigur Olivur.

tór.-

Stevna í Havn um endurnýtslu

Vikuskiftið 7. og 8. februar hevur Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag stevnu í Havn um endurnýtslu. Stevnan verður í Norðurlandahúsinum, og øll kunnu koma við.

Eitt av endamálunum við stevnuni er at vísa á aðrar møguleikar enn brenning fyri at fáa burturkast av vegnum. At tað ber til at endurnýta sumt, og í øðrum londum verður tað eisini meira og meira vanligt at skilja burturkastið.

Ætlanin er eisini at lýsa brennistaðarspurningin. Tosað verður bæði um, hvussu ein brennistøð virkar, og hvussu hon dálkar.

Nakrir útlendingar koma til stevnuna at greiða frá royndum við endurnýtslu í øðrum Norðurlondum. Fleiri føroyingar koma við sínari vitan um brennistøðir, burturkast, vistfrøði, eiturevnum og mongum øðrum.

Føroya Náttúru- og Umhvørvisverndarfelag fer samstundis at geva út ein faldara um endurnýtslu. Faldarin verður sendur út í hvørt hús í Føroyum, sigur Kári Thomsen í FNU.

randi

Barnaansing eftir vanliga arbeiðstíð

Landsstýrið hevur biðið Almannastovuna kanna tørv og hvør møguleikin er innan núgaldandi lóg at skipa fyri barnaansing eftir vanliga arbeiðstíð.

Hóast vit í Føroyum hava fleiri arbeiðspláss har fólk arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð, hava vit ongar barnaansingarstovnar sum virka hesar tímar av samdøgrinum.

Hetta visti Essemi á Regni á í grein í Sosialinum í mai mánað í fjør. Hon skrivaði millum annað, at á hesum stovnum arbeiða nógvar einsamallar kvinnur sum hava tørv á at fáa børn síni ansað.

Hetta hevði ikki bert komið teimum einsamøllu kvinnunum til góða, men eisin teimum mongu, har t.d. maðurin er burtur við skipi og konan hevur eitt arbeiði við »forskotnari« arbeiðstíð, skrivaði Essemi.

Almannastovan ger kanningar

Nú hevur landsstýrismaðurin í sosialmálum, Niels P. Danielsen biðið nýggja almannastjóran um at kanna spurningin hjá Essemi á Regni fyri landsstýrinum. Í fyrsta lagi skal Almannastovan kanna tørvin á tílíkum ansingarplássum og hvussu hetta kann skipast best. So skjótt eitt svar er komið frá Almannastovuni, fer landsstýrið at taka spurningin upp til viðgerðar, sigur Niels P. Danielsen.

tór.-



Nr. 57 — 24. mai 1986 tíðindablaðið sosialurin Síða 7

Ansingarmøguleikar eftir vanliga arbeiðstíð

Hetta er lívsneyðugt m.a. fyri einsamallar uppihaldarar sum hava »forskotna« arbeiðstíð

Hóast vit í Føroyum hava fleiri sokallaðar døgnstovnar enn dagstovnar, og tað, at á hesum døgnstovnum eru tað serliga kvinnur, ið arbeiða, finnast ongir ansingarmøguleikar fyri børn eftir vanliga arbeiðstíð.

Somuleiðis vita vit,at á hesum døgnstovnum eru nógvar einsamallar kvinnur ið arbeiða og hava tí stóran tørv at fáa børn síni ansað.

Hetta sigur Essemi á Regni, sum sjálv arbeiðir á døgnstovni og sum er einsamallur uppihaldari.

Vit, sum eru einsamøll sum uppihaldarar, og eisini hava brúk fyri at hava eitt arbeiði — í mongum førum við skiftandi arbeiðstíðum — áttu eisini at havt møguleikan at fingið børn okkara ansað undir góðum og tryggum umstøðum.

Til dømis kundi hetta verið gjørt á tann hátt, at nakrir av verandi dagstovnum hava opið eftir vanliga arbeiðstíð. Annar møguleiki er —kanska her grundarlag ikki er fyri stovni — at skipað verður fyri barnaansing á annan hátt. Nakað á sama hátt, sum heimahjálpin arbeiðir, sigur Essemi, og hon heldur fram:

— Væl veit eg, at vit eru ein minniluti í samfelagnum, men áttu hóast tað, eisini at fingi ávísar møguleikar. Tað er nógv fyri, at hoyra politikarar tosa um at teir hava ikki

Hetta er bæði ein lands- og ein kommunal uppgáva. Kommunurnar kundu kanska útvega høli o.t. meðan landsstýrið átti at skapt tær neyðugu fíggjarligu rammurnar.

Essemi sigur seg ikki hava nakrar patentloysnir á hesum øki, men leggur dent á, at her er veruliga ein tørvur sum nógv fólk hava í dag og enn fleiri í framtíðini. Talan er nevniliga ikki bert um einsamallar uppihaldarar, men eisini um tey mongu, har t.d. maðurin er burtur við skipi og konan hevur eitt arbeiði við »forskotnari« arbeiðstíð.

Um tað veruliga er so, at lógarheimild ikki er fyri hesum ansingarmøguleikum uttan fyri vanliga arbeiðstíð, so er hesin støttur sørvísi fyri enn onnur. Essemi vónar við hesum, at hava givið politikarunum nakað at hugsa um, og at hetta ikki verður, sum við so nógvum øðrum, at tað

Essemi á Regni: Vit, sum eru einsamallir uppihaldarar og arbeiða við skiftandi arbeiðstíðum, hava eisini rætt til at fáa okkara børn ansað undir góðum og tryggum umstøðum

Útbjóðing

Vegna Vágs Býráð verður arbeiðið við at klæða og skifta vindeygu í gamla skúla boðið út alment.

Útbjóðingartilfar fæst til láns á kommunuskrivstovuni.

Tilboðini verða latin upp á kommunuskrivstovuni mánadagin tann 2. juni 1986 kl. 11.00.

Teir bjóðandi kunnu vera hjástaddir.

VÁGS BÝRÁÐ

ÚTRÓÐRARBÁTAR

Í fjør vár nam Essemi á Regni við spurningin um at skipa fyri barnaansing eftir vanliga arbeiðstíð. Hon vísti á, at tey eru mong, sum arbeiða uttan fyri vanliga arbeiðstíð, og hava ongan at ansa børnunum.